LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**

**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 081/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Beintu Løve Jacobsen, løgtingsmanni, um at seta radara upp í Føroyum**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Nær fingu løgmaður og landsstýrið kunning um ætlanirnar og semjuna um at seta radara upp í Føroyum?

2. Frá hvørjum kom henda kunningin?

3. Hvat svaraðu løgmaður og/ella landsstýrið til hesa kunning?

**Svar:**

**Til spurning 1, 2 og 3:**

Í almennu frágreiðingini "Forsvarsministeriets fremtidige oppgaveløsning" frá 2016 verður tørvurin á radaraeftirliti úr Føroyum fyrstu ferð er nevndur aftur, síðani táverandi radarin á Sornfelli var tikin niður í 2007.

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum varð í november 2019 kunnaður av embætisfólkum sínum um, at ein lofteftirlitsradari í Føroyum møguliga fór at verða partur av sonevnda Arktis-kapasitetspakkanum hjá donsku stjórnini. Hetta var eftir samskifti á embætisstigi millum Uttanríkistænastuna og danska Verjumálaráðið.

Síðani hevur málið um kapasitetspakkan og tørvur á lofteftirliti javnan verið frammi í tíðarskeiðinum frá november 2019 til nú.

Mikudagin tann 10.februar 2021 varð løgmaður kunnaður av sínum embætisverki um, at semjan millum flokkarnar á Fólkatingi nú høvdu funnið eina semju um kapasitetspakkan, sum eisini fevnir um ein radara í Føroyum. Sama dag kunnaði danski verjumálaráðharrin landsstýrismannin í uttanríkis-og mentamálum um semjuna millum flokkarnar í Danmark. Landsstýrismaðurin fekk eisini at vita á videofundinum við danska verjumálaráðharran, at semjan eftir ætlan skuldi leggjast fram á tíðindafundi dagin eftir, hósdagin 11.februar 2021.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum hevur frá byrjan í samskiftinum við danskar myndugleikar gjørt vart við, at tað hevur avgerandi týdning, at ein avgerð um ein lofteftirlitsradara skal vera grundað á politiska viðgerð í Føroyum.

Semja er við donsku stjórnina um hetta. Tí verður eingin ætlan útint, fyrr enn avgerð er tikin um málið í Føroyum.

Í Tinganesi, 17. februar 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður